# Bygdarráðsfundur

## Hvalbiar Kommuna

**Dagfesting:** 22.07.2016 kl. 16.00

Á fundi: Rúni Thomsen
Magni Bertholdsen
Eyðfinn Debes
Martin í Nesi
Niels J. Thomsen
Jóhan Eli Poulsen

Ikki møtt: Trúgvi Gudmundarson

Skrivari: Johanna B. Djurhuus

1. **Umsókn um fíggjarligan stuðul frá Suðuroyar Norðara Bjargingarfelag.**
   Felagið hevur ætlanir um at keypa bygningin Agnavík á bryggjuni í Nesi og søkir um stuðul til húsakeypið. Harumframt verður søkt um ein árligan rakstrarstuðul til felagið. Samtykt varð einmælt at stuðla við kr. 50.000,- til húsakeypið og kr. 25.000,- í rakstrarstuðli árliga í 2016 og 2017.

2. **Innkomin boð uppá jørð til at heysta 2016.**
   Samtykt varð at leiga jørðina til hægstbjóðandi Erhard Eyvindsson Støðlarnar matr. nr. 390f og Ragnar Eyvindsson í Sondunum matr. nr. 145a.

3. **Skriv frá borgara um asfalt á innkoyring.**
   Samtykt varð at siga frá, at Hvalbiar Kommuna á fundi tann 06.03.2014 hevur samtykt ikki at asfaltera tún, innkoyringar o.a. hjá privatfólki.

4. **Skriv frá Hagastýrinum undir Rókunum um at grava eftir vatni.**
   Í sambandi við umsókn um loyvi at grava ein kaðal til ta heimastu kolaminuna, er hagastýrið undir Rókunum jaligt hesum viðvíkjandi og ynskja teir at hava ein fund við bygdarráðið um hesi viðurskifti.

5. **Viðurskifti á Fiskieiðinum – mál frá Vega- og havnanevndini.**
   Nevndin ger vart við ymisk viðurskifti á Fiskieiðinum. Samtykt varð at fáa gelendaran gjørdan og bøtt um garðin. Harumframt varð samtykt at víðka um vendiplássið og kanna dráttin.

6. **Neystaøkið á Hamranesi – mál frá Vega- og havnanevndini.**
   Vega- og havnanevndin hevur havt fund við eigarar av neystagrund á Hamranesi. Samtykt varð, at tey fáa tilboð um neystagrund í Nesi ella pening útgoldnan sambært meting.

7. **Uppskot um frítíðardagar í kommununi í august – mál frá Trivnaðarnevndini.**
   Skotið verður upp at hava tríggjar útidagar við gongutúrum í Sandvík, Nesi og til síðst í Hvalba. Samtykt varð at skipa fyri hesum døgum frá 18. – 20. august og skipa soleiðis fyri, at fólk tekna seg til tiltakið.

8. **Kunning um hvørji mál eru beind í nevnd síðani síðsta fund.**
   **Tekniska nevnd:**
   - Umsókn um byggiloyvi til altan á matr. nr. 213c, Hvalba.
   - Umsókn um byggiloyvi til bilhús á matr. nr. 190h, Hvalba.
   - Skriv frá Vatnsýnisnevndini í Sandvík.

   **Vega- og havnanevnd:**
   - Skriv víkjandi dráttinum undir neysti í Nesi.
   - Skriv viðvíkjandi vegi niðanfyri hús á matr. nr. 29c í Nesi.

9. **Kunning um málsviðgerð síðani síðsta fund.**
   **Tekniska nevnd (framløga Magni Bertholdsen):**
   - Byggiloyvi til altan á matr. nr. 213c: Samtykt varð einmælt at geva byggiloyvi til altan sambært umsókn, tekningum og givnum upplýsingum.
   - Byggiloyvi til bilhús á matr. nr. 190h: Samtykt varð einmælt at geva byggiloyvi til bilhús sambært umsókn, tekning og givnum upplýsingum.
   - Vatnsýnisnevndin í Sandvík: Hetta mál er avgreitt.

   **Vega- og havnanevnd (framløga Eyðfinn Debes):**
   - Tvey skriv frá borgara: Eyðfinn kunnaði um, at nevndin ikki hevur viðgjørt málini og verða tey útsett til komandi fund.

10. **Ikki almenn mál:**
    2 mál vórðu viðgjørd fyri afturlatnum hurðum.

Fundarbókin lisin og skrivað undir. Fundur lokin kl. 18.45